UTTAN ÚR HEIMI

### Illgruni um valsvik í Irak

Irakska valnevndin kunngjørdi í gjár, at úrslitið av fólkaatkvøðuni um grundlógina er seinkað nakrar dagar, tí nevndin hevur gjørt av at telja ein part av atkvøðunum umaftur. Kortini heldur nevndin, at grundlógaruppskotið hevur fingið tann neyðuga meirilutan.

Men avgerðin at útseta úrslitið hevur fingið tann sunnimuslimska minnilutan at leggja myndugleikarnar undir valsvik, skrivar Reuters. Tað er greitt, at tveir sunnimuslimskir landspartar hava atkvøtt ímóti grundlógini, og er úrslitið tað sama í einum landsparti afturat, fellur uppskotið.

George W. Bush, forseti, hevur fagnað fólkaatkvøðuni, men fyrrverandi uttanríkisráðharri hansara Colin Powell ávarar amerikanararnar ímóti at halda, at nú er alt gott. Í einari sjónvarpssamrøðu segði Powell, at fólkaatkvøðan er eitt týðandi stig, men hon merkir ikki, at Irak er komið á mál, segði hann.

### Ísakalt í Miðeystri

Viðurskiftini ímillum ísraelsmenn og palestinar eru versnað nógv, eftir at tríggir ísraelsmenn vórðu skotnir á Vestara Áarbakka seinasta vikuskiftið. Teir palestinsku myndugleikarnir hava fordømt atsóknina, men tað hevur ikki sissað ísraelsku stjórnina.

Atsóknin hevur havt við sær, at ísraelska verjumálaráðið hevur kvett alt samband við teir palestinsku myndugleikarnar, og ein hernaðarkelda sigur við AP, at herurin fer at kringseta allar teir størstu býirnar á Vestara Áarbakka. Tað fer millum annað at bera í sær, at palestinar sleppa ikki at ferðast ímillum býirnar í egnum bili, men bara við bussum.

Víðgongdi palestinski felagsskapurin Al-Aqsa Brigadurnar átók sær ábyrgdina av atsóknini um vikuskiftið, sum kostaði tveimum 21 ára gomlum kvinnum og einum 16 ára gomlum drongi lívið. Síðani hevur ísraelski herurin handtikið 18 limir í ymsum felagsskapum.

### Prodi bjóðar av

Tann vinstrasinnaða andstøðan í Italia hevur gjørt av, at Romano Prodi verður hennara forsetavalevni á tjóðartingsvalinum næsta ár.

Teir italsku vinstraflokkarnir hava verið ósamdir í fleiri ár, men nú tykjast teir vera samdir um at fáa Silvio Berlusconi, forsætisráðharra frá. Í samgonguni, sum styðjar Prodi, eru sosialistarnir, kommunistarnir, tey grønu og viðhaldsfólk hjá einum av stjórnarflokkunum.

Men sigurin hjá Romano Prodi kom at standa í skugganum av einum morði, sum skakaði alt Italia sunnudagin. Menn í gekkaskorti skutu varaforsetan í landspartinum Calabria, og tað er eingin ivi um, at tað var mafian, sum hevði givið boðini um at beina fyri honum. Varaforsetin var oddamaður í miðflokkinum Margherita, og hann varð skotin, tá hann var á veg at greiða atkvøðu á landspartavalinum.

### Aftur eitt roykibann

Tað gerst alt trengri og trengri hjá roykjarunum í Evropa. Noreg og Írland hava bannað fólki at roykja á vertshúsum og øðrum arbeiðsplássum, og nú hendir tað sama í Norðurírlandi. Tað hevur stjórnin í London gjørt av.

Heilsumálaráðharrin á teirri serligu norðurírsku ráðstovuni í London, Shaun Woodward, sigur við AP, at myndugleikarnir ætla sær ikki at banna norðurírum at roykja, men at teir sleppa ikki at roykja, meðan teir eru til arbeiðis. Men norðurírar fáa stundir at fyrireika seg til roykibannið, tí ætlandi kemur tað ikki í gildi fyrr enn í apríl í 2007.

Shaun Woodward var herfyri í Dublin og kannaði, hvørja ávirkan roykibannið har hevur havt, og hann letur væl at.

- Tað er gott, at tað ber til at fara inn á eitt vertshús, uttan at einum nýtist at sita og turka sær um eyguni alla tíðina, sigur hann við AP.

# Lítil vandi fyri fuglakrími í Evropa

**Hóast fuglakrím er staðfest í Landssynningsevropa, er lítil vandi fyri, at sjúkan fer at gera um seg í okkara heimsparti**

FUGLAKRÍM
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Tað er sera lítil vandi fyri, at fuglakrímið fer at smitta fólk, sigur Johan Giesecke á influensudeildini hjá ES. Hann hevur fingið starvið sum vísindaligur leiðari á nýggju influensudeildini, sum ES hevur stovnað, og sum heldur til undir liðini á Karolinska sjúkrahúsinum í Stockholm.

Johan Giesecke sigur, at tey, sum arbeiða við sjúkum ella deyðum fugli um dagarnar, eru í einum ávísum vanda fyri at verða smittað, men hinum nýtist als ikki at hugsa um tað. Hann heldur, at vandin fyri, at fuglakrím fer at smitta fólk í Evropa, er sera lítil, men at vandin er størri í londunum í Landssynningsasia, har tað er vanligt at selja livandi fugl á marknaðunum.

Spurdur, hvussu stórur vandin er fyri, at fuglakrím sum frá líður fer at smitta ímillum fólk, svarar Johan Giesecke, at tað dugir eingin at siga í dag. Sama svar hevur stjórin á influensudeildini, Zsuzanna Jakob.

Johan Giesecke heldur, at fólk blanda fuglakrímið saman við tær vanligu krímsjúkurnar, sum koma umleið 25. hvørt ár.

- Hesum afturvendandi krímsjúkunum sleppa vit ikki undan. Vit vita ikki, um tann næsta kemur í morgin ella um tíggju ár, men vit eiga at vera fyrireikað, sigur hann og leggur afturat, at eftir hansara tykki er tilbúgvingin á hesum økinum ikki nóg góð. Johan Giesecke heldur, at vit mugu eisini góðtaka vandan fyri, at fuglakrímið kann fara at breiða seg um allan heimin einaferð. Hinvegin kunnu vit ikki gera heilivág ímóti sjúkuni, fyrr enn vit vita, hvussu virusið er háttað, leggur hann afturat.



*Vandin fyri, at fuglakrím fer at smitta fólk í Evropa, er sera lítil, sigur influensustovnurin hjá ES*

*Mynd: Reuters*

# Aftur ein ódn á veg ímóti USA

**Veðurmenninir vænta, at tropiski stormurin "Wilma" verður til eina ódn, og at hon kann raka amerikonsku suðurstrondina**

VEÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Árið í ár er longu tað ringasta ódnarárið í 72 ár. Higartil hava 21 stormar og ódnir herjað í Atlantarhavinum og í tí karibiska økinum, og fleiri kunnu koma afturat.

Amerikonsku veðurmenninir halda nú eyga við tropiska storminum "Wilma". Fyrradagin var hann í landssynning úr Cayman-oyggjunum, sum eru sunnan fyri Kuba, og myndugleikarnir í oyggjunum hava biðið fólk fyrireika seg til illveðrið.

Veðurmenninir vita ikki enn, hvønn veg "Wilma" fer, men teir vænta, at stormurin fer at menna seg til eina ódn teir næstu dagarnar, og at hon fer at leggja leiðina tvørtur um norðara enda á Yucatannesinum í Meksiko og haðani út í Meksikanska Flógvan. Tað hevur fingið amerikanararnar at stúra fyri, hvørjar avleiðingar hon kann fáa fyri oljuútbúnaðin í flógvanum. Fleiri boripallar og oljureinsiverk har fóru illa av ódnini "Katrinu".

Tær fyrstu avleiðingarnar av "Wilma" komu í gjár, tá oljuprísurin hækkaði nógv á marknaðinum í New York, skrivar Reuters.